

www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 04 - 2013

# Oljan kann vara í 300-500 ár aftrat

Hóast sólorka verður framtíðar orkukeldan, so fer oljuøldin at vara leingi aftrat, kanska í 300 til 500 ár heldur saudiarabiski oljumálaráðharrin Ali Ibrahim Al-Nain. Fundur í Riyadh Oljulondini Norra og Saudi Arabia gerast støðugt meira heft at gassi. Men bæði londini eru ótrygg við marknaðirnar skrivar dn.no. Norski oljumálaráðharrin Ola Borte Moe er júst á vitjan í Saudi Arabia, heimsins størsti útflytari av olju. Har hitti hann m.a. oljumálaráðharran Ali Ibrahim Al-Nain. Nógv mál vórðu umrødd, m.a. oljumarknaðurin í smálutum, altjóða broytingar og hvussu skifurgass og skifurolja broyta marknaðin, sigur Ali Naimi við DN. Norra og Saudi Arabia, bæði kongaríki, sum byggja sína vælferð á oljuríkidømi, hava eina felags avbjóðing, og hon er teir lágu gassprísirnir. Borten Moe legði fram kend norsk tøl á fundinum í International Energy Forum í Riyadh. Tølini vísa, at norska oljuframleiðslan fer at fella og fella, meðan gassframleiðslan fer at vaksa. Saudi Arabia hevur eisini stórar ætlanir við gassi, og vit hava somu sjónarmið um heimsins gassmarknaðir. Talan er um nakað av óvissu, serstakliga í ójøvnum økjum. Al-Naini sær eisini stórar møguleikar í sólorku og sigur, at sólin er framtíðin. Hóast hetta er saudiarabiski oljumálaráðharrin sannførdur um, at fossil brennievni fara at vera í brúki í mong mong ár aftrat. Oljuøldin kann vara í 200 til 500 ár aftrat, sigur Al-Naimi við Dagens Næringsliv.